## Ikki fleiri innflytarar

Flestu finnlendingar halda, at landið eigur ikki at taka ímóti fleiri innflytarum. Í einari meiningakanning siga 59 prosent av teimum spurdu, at tey eru ímóti at geva fleiri innflytarum innferðarloyvi. 36 prosent vilja fegin taka ímóti fleiri innflytarum. Úrslitið vísir, at nógvir finnlendingar hava skift støðu í spurninginum um innflytarar. Fyri tveimum árum síðani vildu 56 prosent hava fleiri innflytarar, og fyri einum ári síðani søgdu 45 prosent ja og 44 prosent nei, skrivar FNB.



## Í fongsul fyri at selja tvøst

Ein amerikanskur kokkur kann fáa eitt árs fongsulsrevsing, tí hann borðreiddi við hvalatvøsti á einari matstovu í USA. Tíðindastovan Reuters skrivar, at tveir gestir á matstovuni spurdu, um teir kundu keypa hvalatvøst. Tað vísti seg, at kokkurin hevði eitt sindur av tvøsti, so hann játtaði teimum báðum gestunum tvøst til døgurða. Men tað skuldi hann ikki havt gjørt, tí teir báðir gestirnir vóru embætismenn hjá tollvaldinum. Tað er ólógligt at borðreiða við tvøsti í USA, og kokkurin kann fáa eitt árs fongsul og 100.000 dollarar í bót. Harafturat kann matstovan fáa 200.000 dollarar í bót, skrivar Reuters.

# Úr rokveiði í fiskaloysi

**Góði upsafiskiskapurin hjá partrolarunum, sum vardi í einar 2-3 vikur, er nú minkaður burtur í lítið og einki. Skipini, sum herfyri rokaðust í upsa, eru ikki meiri enn hálvfull, nú tey hava roynt í eina viku. Menn vóna tó, at fiskiskapurin fer at taka seg uppaftur, sum dagarnir ganga**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*12 teir fyrstu dagarnar av mars mánaði landaði landingarmiðstøðin Kongshavn í Saltangará sløk 2200 tons, sum er ein rættiliga stór nøgd upp á so stutta tíð. Partrolararnir høvdu rokveiði í nakrar dagar, men við endan av seinastu viku minkaði upsafiskiskapurin niður í lítið og einki*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Yvir eina lutfalsliga stutta tíð hava partrolararnir rættiliga rokast í upsa.

Í byrjanini av seinastu viku, tá fleiri av skipunum byrjaðu nýggjan túr, høvdu tey okkurt gott tóvið, men sum vikan leið, gjørdist fiskiskapurin rættiliga slakur, og í løtuni er veiðan vánalig.

Soleiðis er góði fiskiskapurin, sum verið hevur , fyribils hasaður av aftur.

### Stutt rok

Á landingarmiðstøðini Kongshavn í Saltangará siga tey, at tey fyrstu skipini, sum nú hava roynt í umleið eina viku, eru væntandi inni aftur í morgin ella hósdagin.

- Um tað hevði verið, sum tað hevur verið seinastu 2-3 vikurnar, høvdu skipini longu verið inni aftur, men enn eru tey ikki meiri enn hálvfull.

Sum skilst, plagar upsafiskiskapurin at minka, eftir at hann hevur verið góður nakrar vikur í bestu vártíð, men síðan plagar fiskiskapurin at taka seg uppaftur einar 2-3 vikur seinni.

Menn halda kortini, at góði fiskiskapurin, sum verið hevur, fekk ein heldur bráðan enda.

### Góðir dagar

Partrolarar vóru í rættiligum upsaroki fyrstu dagarnar av mars mánaði, og bara 12 teir fyrstu dagarnar av mánaðinum landaði landingarmiðstøðin Kongshavn í Saltangará sløk 2200 tons, sum er rættiliga nógv upp á so stutta tíð.

- Í løtuni lata skipini illa at, men tey vóna, at upsafiskskapurin fer at taka seg uppaftur, sum dagarnir ganga, siga tey á landingarmiðstøðini Kongshavn.

Partrolararnir fáa javnt lítið í løtuni, og tí eru tey fyrstu skipini, sum byrjaðu túr fyri viku síðan, enn ikki komin innaftur at landa.

# Nógvur toskur og hýsa á marknaðinum

**Miðalprísurin á Fiskamarknaði Føroya hækkaði aftur við søluna í gjár í mun til lága miðalprísin, sum var hósdagin og serliga fríggjadagin. Prísirnir á hýsu vóru hampiligir, eins og prísirnir á brosmu og longu vóru á góðari leið. Toskaprísurin kundi ivaleyst verið nakað betri, enn hann var við søluna í gjár**

FISKAPRÍSIR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fiskamarknaður Føroya seldi í gjár sløk 330 tons á uppboðssølu fyri góðar 3,4 miljónir krónur.

Góð 124 tons vóru av toski, harav nøgdirnar av toski 3 og toski 4 vóru tær størstu, ávikavist 50 og 41 tons. 20,2 tons vóru eisini av toski 2.

Miðalprísurin fyri tosk 3 og 4 var ávikavist 11,77 og 9,47 krónur fyri kilo.

Góð 75 tons av hýsu vórðu eisini seldu á marknaðinum í gjár, og her vóru nøgdirnar av hýsu 2 tær størstu. Hýsa 2 fekk miðalprísin 10,09 krónur fyri kilo.

Eini 50 tóns vóru av brosmu, og besti miðalprísurin fyri brosmu var slakar 7 krónur fyri kilo.

35 tons vóru av longu, og besti miðalprísurin fyri longu var 10,45.

Miðalprísurin fyri øll fiskasløgini á Fiskamarknaði Føroya í gjár var samanlagt 10,50 krónur fyri kilo.

Hetta er væl betri miðalprísur enn við søluna seinasta hósdag og fríggjadag, tá væl av upsa eisini fór um uppboðssøluna.




*Miðalprísirnir fyri øll fiskasløgini samanlagt eru skiftandi – alt eftir, hvørji fiskasløgini eru. Tað hevur eisini sín týdning, hvør søludagurin er. Mánadag og fríggjadag siglir Silver Fjord av Toftum og niður á skotska marknaðin við fiski*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*